## Professari hjálpa Danmark

Jens Bangso, sum er professari á Københavns Universiteti, skal hjálpa danska fótbóltslandsliðnum í fyrireikingunum til HM endaspælið næsta summar. Bangso er víðagitin sum kropsligur venjari, og hann skal fáa donsku spælararnar í toppform til kappingina. Eitt er, at donsku spælararnir skulu verða í góðum formi, men teir skulu eisini megnað at spæla fótbólt í 1750 metra hædd í Johannesburg.



## Koeman sekkjaður

Niðurlendski fótbóltsvenjarin Ronald Koeman hevur fingið fótin sum venjari hjá AZ Alkmaar. Koeman tók við í felagnum í summar, eftira t Louis van Gaal skifti til Bayern at starvast. Men tað hevur einki gingið hjá AZ síðani, og tað hevur nú kostað Koeman starvið í felagnum. Eftir enn eitt tap um vikuskiftið fall hamarin hjá leiðsluni í felagnum. Koeman var sostatt venjari í bert seks mánaðir í AZ.

# Guttorm og Bjørk skjótast í Havn




Hóast veðrið kann vera ein heldur harðligur mótspælari um veturin, er hugurin at renna so stórur, sum hann ongan tíð áður hevur verið

Mynd: Álvur Haraldsen

**Guttorm Sørensen og Bjørk Herup Olsen komu fyrst um máli, tá næsta umfarið av vetrarkappingini í renning var um vikuskiftið**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Hóast kvøldini eru myrk og veðrið er heldur meira illfýsið, enn tað er um summarið, so heldur hetta ikki føroyingum frá at renna.

Vetrarkappngin varð sett á stovn fyri at halda lív í ítróttini á vetrartíð, og skal metast eftir luttakaratalinum, so er talan um eina dundrandi succés.

Leygarmorgunin varð byrjað á Tórbreyt, tá næsta umfar av vetrarkappingini var á skránni, og knappan tíma seinni komu fyrstu luttakararnir á mál. Ikki óvæntað vóru Guttorm Sørensen og Bjørk Herup Olsen fyrst um málið hjá ávíkavist monnum og kvinnum.

Bjørk var enntá púrasta suveren hjá kvinnum, men tó at Guttorm var væl og virðiliga leysur, so var ikki so øgiliga langt aftur til Paula Johannesen, sum var næstur á málið.

**Vetrakappingin, 2. umfar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Menn 10.992 m.** | | | |
| 1 | Guttorm Sørensen | Treysti | 40,12 |
| 2 | Pauli Johannesen | Bragdið | 40,29 |
| 3 | Henry Olsen | Bragdið | 43,51 |
| 4 | Andrass Joensen | Bragdið | 44,06 |
| 5 | Heini Heinason | Treysti | 44,20 |
| 6 | John Egholm | Hvirlan | 44,41 |
| 7 | Meinar Ortind | Bragdið | 45,40 |
| 8 | Jósvein Herup Olsen | Bragdið | 46,40 |
| 9 | Andreas Josephsen | Treysti | 46,41 |
| 10 | Jens.R. Weihe | Frælsi | 47,19 |
| 11 | Dan Knudsen | Bragdið | 48,13 |
| 12 | Petur Vitalis | Treysti | 48,21 |
| 13 | Jóhan M. Jacobsen | Treysti | 48,23 |
| 14 | Jan Petersen | Treysti | 48,49 |
| 15 | Arnfinn Johannesen | Roysnið | 49,12 |
| 16 | Tummas Joensen | Treysti | 49,27 |
| 17 | Jóhan E. Simonsen | Bragdið | 49,39 |
| 18 | Jón Dahl | Tórshavn | 49,56 |
| 19 | Gunnar Simonsen | Treysti | 50,53 |
| 20 | Hákun Djurhuus | Bragdið | 51,17 |
| 21 | Terje Hansen | Treysti | 51,19 |
| 22 | Bárður Ljósheim | Bragdið | 51,32 |
| 23 | Ólavur Herup Olsen | Bragdið | 54,00 |
| 24 | Hallur Biskopstø | Treysti | 54,05 |
| 25 | Jóannes Ortind | Bragdið | 55,29 |
| 26 | Jón Rasmussen | Treysti | 56,29 |
| 27 | Poul Poulsen | Bragdið | 60,12 |
| 28 | Jóannes Poulsen | Treysti | 60,41 |
| 29 | Álvur Áarstein | Treysti | 62,11 |
| 30 | Fríðrikur Bláhamar | Bragdið | 64,27 |
| 31 | Regin Jóanesarson | Bragdið | 67,13 |
| **Kvinnur 10.992 m.** | | | |
| 1 | Bjørk Herup Olsen | Bragdið | 42,46 |
| 2 | Rannvá Djurholm | Bragdið | 48,06 |
| 3 | Sunniva Bjarnastein | Bragdið | 50,40 |
| 4 | Árna Helmsdal | Bragdið | 53,45 |
| 5 | Ella Áarstein | Treysti | 54,10 |
| 6 | Barbara Christophersen | Bragdið | 54,41 |
| 7 | Rebekka Fuglø | Treysti | 55,11 |
| 8 | Mona Rasmussen | Treysti | 57,20 |
| 9 | Jóngerð Herup Høgnesen | Bragdið | 58,03 |
| 10 | Sigrid Sivertsen | Treysti | 61,05 |
| 11 | Jessie Hansen | Bragdið | 64,49 |
| **Veteranar Menn 10.992 m.** | | | |
| 1 | Henry Olsen | Bragdið | 43,51 |
| 2 | Andrass Joensen | Bragdið | 44,06 |
| 3 | John Egholm | Hvirlan | 44,41 |
| 4 | Jósvein Herup Olsen | Bragdið | 46,04 |
| 5 | Dan Knudsen | Bragdið | 48,13 |
| 6 | Petur Vitalis | Treysti | 48,21 |
| 7 | Tummas Joensen | Treysti | 49,27 |
| 8 | Hákun Djurhuus | Bragdið | 51,17 |
| 9 | Bárður Ljósheim | Bragdið | 51,32 |
| 10 | Hallur Biskopstø | Treysti | 54,05 |
| 11 | Poul Poulsen | Bragdið | 60,12 |
| **Veteran Kvinnur 10.992 m.** | | | |

